# INTEGRASJÓN Í FØROYUM

## Støðulýsing og tilmæli um átøk, juli 2019


### Samandráttur

Í hesum ritinum verður mælt til at fara undir eina føroyska integrasjónslóg. Fyrsta stig í einari slíkari lóggávu eigur at vera at tillaga treytirnar fyri at fáa varandi uppihaldsloyvi í Føroyum, og samstundis menna eitt skikkað undirvísingartilboð í føroyskum sum fremmandamál.



Uttanríkis- og vinnumálaráðið

# Innihaldsyvirlit

1. INNGANGUR ... 2
**Fjølbroyttar uppgávur og avbjóðingar** ... 3
**Umsitingin flutt á føroyskar hendur** ... 4
**Loyvi latin seinastu árini** ... 4
2. MÁL- OG SAMFELAGSUNDIRVÍSING ... 6
3. FLEIRI ÚTLENDINGAR Í FØROYUM ENN NAKRANTÍÐ ... 7
**Flyta serliga av tveimum orsøkum** ... 9
**Útlendska arbeiðsmegin í Føroyum** ... 10
**Øðrvísi tilflyting í Føroyum** ... 12
4. SKYLDAN AT SAVNA ... 14
**Skulu seta krøv** ... 16
5. ÁTØK AT FREMJA ... 19
**1. Tillaga treytirnar fyri varandi uppihaldsloyvi** ... 19
**2. Fyrireika eitt skipað innleiðsluskeið** ... 20
**3. Samantvinna frálæru í føroyskum máli og samfelagsviðurskiftum við starvsvenjing** ... 21
**4. Ein skúli skal standa fyri undirvísingini** ... 22
**5. Eftirútbúgva undirvísarar** ... 22
**6. Gera undirvísingartilfar** ... 23
**7. Krav um førleikar fyri at fáa varandi uppihaldsloyvi** ... 23
**8. Lata næmingum lestrarstuðul** ... 24
**9. Virðismeta arbeiðsroyndir og útbúgvingar** ... 24
**10. Fáa skipan við leiðbeinarum** ... 25
**11. Eggja arbeiðsfólki at læra føroyskt** ... 25
FYLGISKJAL 1 ... 26
FYLGISKJAL 2 ... 28
FYLGISKJAL 3 ... 29
FYLGISKJAL 4 ... 30

**FORORÐ**

Hetta ritið er ein støðulýsing av teimum avbjóðingum, ið eru á integrasjónsøkinum í Føroyum.

Fyrstu stigini til eina komandi skipaða integrasjónslóggávu verða tikin í hesum døgum. Eftir ætlan fer hon í fyrsta umfari fer at fevna um at menna eitt skipað undirvísingartilboð í føroyskum sum fremmandamáli og føroyskum samfelagsviðurskiftum, og við tíðini skal setast sum krav, at útlendingur, ið vil hava varandi uppihaldsloyvi í Føroyum, hevur lokið skeiðið.

Hav í huga, at hetta ritið leggur seg fremst av øllum eftir teimum avbjóðingum, sum eru á økinum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Juli 2019

# 1. INNGANGUR

Í Føroyum skulu tilflytarar duga føroyskt og hava innlit í føroysk samfelagsviðurskifti fyri at fáa varandi uppihaldsloyvi. Tað er bulurin undir uppskotinum um integrasjónslóg, ið skal verða eitt nýtt grundarlag undir einum skipaðum integrasjónspolitikki í Føroyum.

Integrasjón er ein sera víðfevnd og samansett uppgáva at loysa. Eitt landsfevnandi mál- og samfelagsskeið fyri útlendingar skal skiljast sum fyrsti liður í einari integrasjónslóg, ið skal víðkast og mennast við tíðini, tí integrasjónspolitikkur er ein áhaldandi tilgongd, ið støðugt skal dagførast og tillagast.

Integrasjónsarbeiðið í Føroyum hevur higartil ikki verið miðvíst. Einstøk tøk eru tikin, og einstakar kommunur hava bæði sjálvstøðugt og í samstarvi við landsmyndugleikar roynt seg við átøkum. Men í stóra høpinum er integrasjónsøkið í Føroyum ov óskipað, og av somu orsøk er neyðugt við einari integrasjónslóg, sum setur karmarnar fyri føroyskan integrasjónspolitikk. Av tí, at uppgávan er at fáa eitt sera margtáttað økið í fasta legu, verður mett skilabest at byrja avmarkað og málrættað við at stovna eitt skikkað landsfevnandi skeiðstilboð og seta sum treyt, at útlendingur hevur lokið skeiðið fyri at fáa varandi uppihaldsloyvi. Tað er fyri at brúka orkuna rætt og vissa sær, at einstøku átøkini røkka sínum endamáli.

Gerast skal vart við, at hetta ritið leggur seg miðvíst eftir teimum, sum vilja hava eitt varandi uppihaldsloyvi í Føroyum – og í minni mun at teimum útlendingum, sum flyta til Føroya við einum arbeiðs- og uppihaldsloyvi at arbeiða eitt tíðarskeið. Allir útlendingar í Føroyum skulu kortini sjálvsagt eggjast til at læra málið.

Somuleiðis skal gerast vart við, at hetta ritið leggur seg í størstan mun eftir teimum avbjóðingum, sum eru á økinum, og hevur minni atlit at tí, sum riggar væl. Eingin ivi er um, at nógvir fastbúgvandi útlendingar í Føroyum fella væl til og trívast væl í føroyska samfelagnum. Tey eru virkin, opin og forvitin, og hava ein skarða av fólki rundan um seg, ið geva teimum góðar karmar at virka í. Men í øðrum førum riggar integrasjónin illa, og óloystu avbjóðingarnar eru bæði nógvar og fjølbroyttar, sum skulu takast í størstum álvara.

**Fjølbroyttar uppgávur og avbjóðingar**
Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur í hesi tilgongdini havt samband við nógvar stovnar, kommunur og einstaklingar. Tey eru Mentamálaráðið, Nám, Útlendingastovan, Barnaverndin, Tórshavnar kommuna, Klaksvíkar kommuna, Tvøroyrar kommuna, Eiðis kommuna, Vágs kommuna, Kvøldskúlin á Tvøroyri, Kommunufelagið, Gigni, Hagstova Føroya, Kvinnuhúsið, Runa Preeti Isfeld, Erika Hayfield, Katrin Lydersen Jacobsen, Ivan Hentze Niclasen og Winda Petersen.

Greiði boðskapurin er, at tað er høpisleyst at taka samanum integrasjónina í Føroyum við einkultum tiltøkum ella einføldum niðurstøðum. Tað finst eingin heildarloysn, sum einfalt og lætt kann greiða avbjóðingarnar við integrasjón í Føroyum. Integrasjón fer fram í nógvum ymiskum liðum í gerandisdegnum, og uppgávurnar og avbjóðingarnar eru ymiskar, tí útlendingar í Føroyum eru ein sera fjølbroyttur bólkur av fólki, sum hevur lítið í felag, uttan tað, at tey ikki eru fødd sum føroyingar. Tey hava ymiskan uppruna, ymiskan tørv og ymiskar førleikar. Summi duga føroyskt nøkulunda, onnur duga ikki. Útbúgvingarstøðið fevnir um alt frá útbúnum akademikarum til fólk við mest sum ongari skúlagongd. Nøkur hava góðar og tryggar umstøður at liva og virka í, meðan onnur hava verri kor. Nøkur eru úr ensktalandi londum, meðan ein stórur partur eru úr londum, har málið er av aðrari

rót enn teirri induevropeisku við øðrum skriftteknum enn latínska stavraðið. Tað vil siga, at bólkurin av útlendingum í Føroyum er sera marghátttaður.

Í stuttum kann sigast um avbjóðingarnar, at 1) ongantíð fyrr hava so nógvir útlendingar búð í Føroyum, 2) mentanarligi og sosiali munurin ger í nøkrum førum, at summir útlendingar hava trupult við at finna seg til rættis sosialt og á arbeiðsmarknaðinum, og 3) dagstovnum, skúlum og øðrum stovnum vanta orku, fígging og amboð til at tillaga seg broyttu umstøðurnar við nógvum útlendingum

## Umsitingin flutt á føroyskar hendur

Í mai 2019 samtykti løgtingið broytingar í útlendingalógini, so Útlendingastovan frameftir kann umsita og taka avgerðir í málum um familjusamanføring, arbeiðs- og uppihaldsloyvi, uppihaldsloyvi fyri lesandi o.a. Fyri at málini kunnu verða flutt Útlendingastovuni er neyðugt við broytingum í donsku útlendingalógini. Uppskotið varð lagt fyri Fólkatingið, men varð ikki samtykt, áðrenn fólkatingsvalið varð útskrivað at vera 5. juni í ár. Broytingarnar væntast tí í fyrsta lagi at fáa gildi á heysti 2019. Reglurnar fyri innferð og uppihald í Føroyum eru ikki broyttar, men tað er ásett, at føroyskir myndugleikar kunnu eftir samráðingar við donsku stjórnina seta sum treyt fyri at fáa varandi uppihaldsloyvi í Føroyum, at viðkomandi útlendingur hevur tætt tilknýti til Føroyar og skal lúka málslig krøv, umframt at hava innlit í føroyska mentan og samfelagslig rættindi og skyldur. Tað er henda møguleikan, sum mælt verður til at brúka.

## Loyvi latin seinastu árini

Alsamt fleiri útlendingar fáa varandi uppihaldsloyvi í Føroyum. Í fjør fingu 55 fólk úr 25 ymiskum londum varandi uppihaldsloyvi í Føroyum:

Filipsoyggjunum (20), Rumenia (4), Teilandi (3), Makedonia (3), Gana (2), USA (2), Serbia (2), India (2), Brasilia (1), Kenja (1), Póllandi (1), Russlandi (1), Bretlandi (1), Ukraina (1), Ungarn (1), Kili (1), Italia (1), Senegal (1), Ekvador (1), Írland (1), Jameika (1), Kroatia (1), Nigeria (1), Uganda (1) og Bosnia-Hersegovina (1).

Talvan niðanfyri vísir, hvussu nógvir útlendingar hava fingið varandi uppihaldsloyvi seinastu árini. Tey flestu hava fingið varandi uppihaldsloyvi eftir at hava verið familjusameind, meðan onnur hava búð og arbeitt í Føroyum í sjey ár ella meira, og hava síðan fingið varandi uppihaldsloyvi:

**Varandi uppihaldsloyvi latið í Føroyum**

| Árstal | Loyvi givin | Kom sum familjusameind | Kom at arbeiða, lesa o.a. |
|---|---|---|---|
| 2011 | 46 | 27 | 19 |
| 2012 | 37 | 26 | 11 |
| 2013 | 41 | 36 | 5 |
| 2014 | 49 | 40 | 9 |
| 2015 | 50 | 41 | 9 |
| 2016 | 9 | 7 | 2 |
| 2017 | 71 | 65 | 6 |
| 2018 | 55 | | |

Fá loyvi vóru givin í 2016, tí málsviðgerðartíðin var munandi longri enn vanligt, upplýsir Útlendingastovan. Tað er enn ikki greitt, hvussu nógv av teimum 55, sum fingu varandi uppihaldsloyvi í 2018, komu til Føroya sum familjusameind ella at arbeiða, lesa o.a.

Annars fingu 31 børn fyrstu ferð uppihaldsloyvi í Føroyum í fjør - 11 sum familjusamanførd og 20 sum komu við foreldrum, ið høvdu við arbeiðsloyvi- og uppihaldsloyvi. 55 børn fingu longt sítt uppihaldsloyvi, og trý børn fingu longt sítt uppihaldsloyvi fram til sín 18 ára føðingardag.

Eisini fingu 648 fólk arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum fyri fyrstu ferð í fjør, meðan 394 fólk fingu sítt verandi arbeiðs- og uppihaldsloyvi longt eitt ár afturat.

**FØROYSKI FÓLKASKÚLIN**

Talið á fremmandamæltum næmingum í fólkaskúlanum økist støðugt, og hetta er ein stór avbjóðing í fólkaskúlanum. Næmingarnir eru úr nógvum ymiskum londum og tosa ymisk tungumál, og aldursbýtið spennir eisini víða, sambært *Frágreiðing til aðalorðaskifti um fólkaskúlan* frá 2018.

Allir næmingar, sum hava føroyskt sum seinna mál, hava rætt til serstaka undirvísing í føroyskum. Eisini er heimild at veita børnum undir skúlaaldur stuðul til málsliga menning. Skúlastjórar og lærarar, vit hava tosað við, vísa eisini á, at málførleikin hjá børnum við útlendskari mammu er í nógvum førum ikki nøktandi. Orsøkina til hetta halda tey í flestu førum vera, at føroyski pápin er í ov lítlan mun hjástaddur, meðan útlendska mamman sum frægast hjálpir barninum við heimaarbeiði o.ø. Ein onnur avbjóðing hjá fleiri næmingum er, at teir ikki duga nakað norðurlendsk mál, og danskt er kravd lærugrein frá 3. flokki. Tað vil siga, at næmingarnir skulu læra tvey nýggj mál, bæði føroyskt og danskt. Hetta er serliga ein stór avbjóðing, tá ið næmingarnir koma til Føroya sum tannáringar og skulu taka 9. floks prógv.

Umframt útbúgving at undirvísa fremmandamæltum, vantar eisini námsætlan og tilfar til fremmandamáls undirvísing fyri næmingar í fólkaskúlaaldri. Sjøtul er settur á arbeiðið.

Tað er trupult hjá skúlaverkinum at hjálpa børnum úr Miðeystri og Afrika í skúlaaldri, sum fáa familjusameining í Føroyum, um tey ikki duga føroyskt, danskt ella skandinaviskt. Tað er trupult at samskifta við tey, og børnini kunnu mest sum ikki brúka undirvísingartilfarið í føroyska fólkaskúlanum. Tey skulu brúka nógvu orku at læra seg bæði føroyskt og danskt, og verða av somu orsøk afturúrsigld í øðrum lærugreinum. Tað ávirkaðir bæði trivnaðin og møguleikarnir fyri framhaldandi útbúgving. Hetta er fremsta orsøkin til, at danskir myndugleikar hava hert krøvini til familjusameining fyri børn, millum annað, at metast skal um framtíðarmøguleikar hjá barninum at kunna finna seg til rættis í Danmark.

Tað er eisini vert at hefta seg við, at kanningar í Danmark vísa, at børn hjá tilflytarum úr Miðeystri og Afrika, bæði annað og triðja tilflytaraættarlið, fáa ikki betur próvtøl enn í skúlanum enn ættarliðini undan teimum. Fleiri teirra fáa heldur ikki eina miðnámsútbúgving. Líknandi kanningar eru ikki gjørdar í Føroyum.

## 2. MÁL- OG SAMFELAGSUNDIRVÍSING

Í Føroyum hevur í nógv ár verið víst á tørvin at fáa samskipaða mál- og samfelagsundirvísing til nýkomnar tilflytarar, sum skal geva teimum viðkomandi førleikar innan mál, arbeiðsmarknað, útbúgving og samfelag. Millum annað hevði Integrasjónsálitið frá 2011 hetta sum høvuðstilmæli.

Altjóða kanningarúrslit um integrasjón vísa, at avmarkaður málsligur førleiki, avmarkað vitan um samfelagið og mentan, og avmarkað atgongd til arbeiðsmarknaðin, hindra integrasjónini. Málkunnleiki verður samstundis mett at vera ein fyritreyt fyri, at ein útlendingur kann luttaka í samfelagnum á jøvnum føti við aðrar borgarar.

At duga eitt mál fevnir um førleikar sum at skilja onnur, at tosa skilligt og nøkulunda neyvt og flótandi, og at lesa og skriva. Við ávísum málsligum førleikum kann ein útlendingur í minsta lagi klára seg í gerandisstøðum, skilja samrøður millum fólk og skilja stuttar tekstir og yvirskriftir í sjónvarpi og útvarpi.

Mentamálaráðið skrivaði eina námsætlan í føroyskum sum fremmandamál í 2014, har tað var skilmarkað, hvat ein tilflytari, ið dugir føroyskt sum fremmandamál, skal vera førur fyri. Tað er:

- At tosa og skriva skilliga og rætt við bert heilt fáum villum, sum ikki darva samskiftið
- At hava eitt fjølbroytt orðatilfeingi fyri at kunna málbera seg neyvt
- At samskifta nøkulunda flótandi á føroyskum í ymsum sosialum høpi
- At skifta ímillum ymisk sløg av samskifti við atliti at, hvønn samskift verður við

Sambært somu námsætlan, sum Mentamálaráðið skrivaði í 2014 í føroyskum sum fremmandamáli, skal ein tilflytari, sum hevur innlit í føroyska mentan og samfelagsviðurskifti, vera førur fyri:

- At røkja eitt starv í Føroyum, sum í størst møguligan mun samsvarar við útbúgving, hann/hon hevur
- At luttaka í eftirútbúgving, sum gevur størri møguleikar á føroyska arbeiðsmarknaðinum
- At kenna síni rættindi og skyldur í samfelagnum og at vera partur av okkara fólkaræði við ávirkan og ábyrgd
- At taka lut í føroyska mentanarlívinum og at ávirka mentanartilboð og upplivingar – t.d. við at greiða frá síni egnu mentan og sínum royndum
- At kenna bygnað og stovnar í føroyska samfelagnum, at duga at leita sær hjálp og at gerast virkin fólkaræðisliga og mentanarliga

Gerast skal greitt, at tað er ikki lætt hjá útlendingum at læra føroyskt, og tað er ikki ein uppgáva, sum eitt arbeiðspláss, familja ella ein kommunalur kvøldskúli megnar einsamalt. Landsins myndugleikar hava tískil einki annað val enn at uppraðfesta hetta økið, ásannandi, at málsligur førleiki er alneyðugur fyri, at ein útlendingur kann vera virkin á arbeiðsmarknaðinum og skapa sær eina tilveru í Føroyum. Tí skal verða sett sum treyt, at ein útlendingur skal hava ognað sær hesar førleikar fyri at fáa varandi uppihaldsloyvi í Føroyum.

## 3. FLEIRI ÚTLENDINGAR Í FØROYUM ENN NAKRANTÍÐ

Útlendingar eru vorðin ein sjálvsagdur partur av føroyska samfelagnum. Gongdin seinastu 20 árini vísir, at fólkasamansetingin broytist spakuliga, tí talið av útlendingum í Føroyum er vaksandi. Tann 1. januar 2019 vóru 1.794 fólk við øðrum ríkisborgaraskapi enn donskum skrásett at búgva í Føroyum, sambært Hagstovuni. Teirra millum vóru 319 norðurlendingar. Hendan stabbamyndin vísir, at munandi fleiri útlendingar eru í Føroyum nú enn fyri tjúgu árum síðan. Stóri vøksturin seinastu trý árini skyldast serliga arbeiðsmegi úr ES-londum.




Hendan stabbamyndin vísir, hvussu nógv fólk við øðrum ríkisborgaraskapi enn donskum høvdu skrásettan bústað í Føroyum tann 1. januar í 1999, 2009 og 2019, býtt á meginland. Tað er í hesum høpinum serliga vert at hefta seg við, at seinastu 20 árini eru nógv fleiri fólk úr Asia og Afrika flutt til Føroya.




| | Norðurlond annars | Evropa annars | Amerika | Afrika | Asia | Osiania og Póløkini |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1999 | 225 | 161 | 29 | 5 | 26 | 6 |
| 2009 | 312 | 458 | 68 | 56 | 173 | 10 |
| 2019 | 319 | 767 | 119 | 143 | 412 | 9 |

Afturat hesum eru 25 fólk í Føroyum, sum Hagstovan hevur skrásett at hava ókendan ríkisborgaraskap. Gerast skal eisini vart við, at norðurlendingar – í hesum føri íslendingar, sviiar, norðmenn og finnar – kunnu búseta seg og arbeiða frítt í Føroyum uttan serligt loyvi. Norðurlendingar verða tískil ikki fevndir av tillagaðum treytum í sambandi við uppihaldsloyvi.

Tá ið hagtøl fyri útlendingar í Føroyum verða gjørd upp, verður atlit í mongum førum ikki tikið fyri norðurlendingum, og tískil ber eisini til at siga, at 1.475 útlendingar eru í Føroyum, alt eftir, hvussu hetta verður gjørt upp. Danir eru nógv tann største einstaki bólkurin av útlendingum í Føroyum, men havast skal í huga, at danir og grønlendingar, búsitandi í Føroyum, hava danskan ríkisborgararætt og telja ikki sum norðurlendingar. Tað vil siga, at danir og grønlendingar telja ikki sum ein sjálvstøðugur bólkur í hesum uppgerðunum.

Hendan talvan niðanfyri vísir útlendingar í Føroyum við øðrum ríkisborgaraskapi enn donskum, býtt á tjóðskap. Legg til merkis, at tað er bara úr Filipsoyggjum og Teilandi, at tað eru munandi fleiri kvinnur enn menn. Fólk úr Rumenia og Póllandi eru í høvuðsheitum arbeiðsmegi.




Hav í huga, at børn, ið hava føroysk og útlendsk foreldur, eru sum útgangsstøði eisini danskir ríkisborgarar og telja ikki við í hesari uppgerðini. Børn, ið hava tvey útlendsk foreldur, hava hinvegin sum útgangsstøði annan enn danskan ríkisborgaraskap.

Flestu av teimum, sum eru undir 18 ár við øðrum ríkisborgaraskapi enn donskum, eru úr Filipsoyggjum (44), Íslandi (34), Rumenia (25), Serbia og Montenegro (23) og Norra (16).

**Flyta serliga av tveimum orsøkum**

Útlendingar, sum flyta til Føroya, koma í høvuðsheitum av tveimum orsøkum. Meginparturin kemur til Føroya at arbeiða eitt tíðarskeið. Tann stóri vøksturin í bólkinum *Evropa annars* seinastu 20 árini, vísandi til talvuna á síðu 5, eru serliga fólk, sum hava fingið arbeiðs- og uppihaldsloyvi, sambært Útlendingastovuni. Føroyskar fyritøkur hava síðan 2008 havt lættari atgongd til arbeiðsmegi úr ES, tá ið arbeiðsloysið í Føroyum fer niðurum 3,5 prosent. Skipanin ásetur, at útlendingar úr ES-londum, sum hava eitt arbeiðstilboð frá einum arbeiðsgevara í Føroyum, sum í minsta lagi er 30 tímar um vikuna sambært vanligari sáttmálaløn á føroyskum arbeiðsmarknaðinum, kunnu fáa uppihaldsloyvi í Føroyum, um so er, at arbeiðsloysið er undir 3,5 prosent.

Eitt arbeiðs- og uppihaldsloyvi er galdandi fyri eitt ár í senn, og tú skal søkja um at fáa tað longt hvørt ár. Sambært Útlendingastovuni eru útlendingar, sum flyta til Føroya, sum oftast í Føroyum í nøkur ár, tað vil siga, at tey flestu søkja um at fáa sítt arbeiðs- og uppihaldsloyvi longt. Tað ber kortini illa til at siga, hvussu leingi tey eru her í miðal.

Útlendingur, sum hevur verið í Føroyum við arbeiðs- og uppihaldsloyvi í sjey ár, kann søkja um at fáa varandi uppihaldsloyvi. Treytirnar, ið verða settar fyri at fáa varandi uppihaldsloyvi, eru, at viðkomandi hevur eitt arbeiðstilboð, ikki er revsaður og ikki hevur skuld til tað almenna. Norðurlendingar kunnu sum nevnt búseta seg og arbeiða frítt við ongum loyvi.

**IKKI-VESTURLENDSKAR KVINNUR Í FØROYUM**

Runa Preeti Ísfeld vardi í juni 2019 sína ph.d.-ritgerð um lívið hjá kvinnum úr ikki-vesturlendskum londum, sum eru giftar til Føroya. Ritgerðin er fyri stóran part bygd á samrøður við kvinnur, ið eru fluttar til Føroya - 21 samrøður í alt, av hesum eru fýra samrøður við pør.

Nakrar av avbjóðingunum eru, at nógvar ikki-vesturlendskar kvinnur verða møttar við misáliti og fordómum og nógvum stereotypum fatanum. Sum dømi sigur ein kvinna, at *"stigmatisation of my marriage is something I experience quite often, some people look down on my marriage as they think I'm here due to money, and that I am poor and needed a man to save me."* Fatanin í nærumhvørvinum er ofta, at tær eru keyptar ella eru komnar til Føroya at finna lukku. Tær hava eisini avbjóðingar við at læra seg føroyskt, og tær flestu fáa bara størv, har málførleiki ikki er neyðugur.

Ein onnur sigur, at "*I don't feel appreciated here by the government, and I feel bad as so many people look down on us – some people think that we're not educated and we can't do anything else than cleaning jobs or unqualified jobs! Sometimes I want to scream at these people, to let them know that I'm a well educated woman, and that I would be doing a better job than them if I was given the chance in my home country*."

Ritgerðin lýsir, at kvinnurnar eru ikki eins, og tær koma til sera ymiskar karmar og umstøður. Summi hava góðar karmar, onnur hava minni góðar. Munur er eisini, um kvinnurnar eru giftar til Havnar ella smærri bygdir í Føroyum.

Aðrir útlendingar flyta til Føroya sum familjusameind, tað eru serliga hjúnafelagar og børn, sum roknast kann við fara at búgva í Føroyum í longri tíð. Útlendingastovan vísir á, at tey flestu, sum søkja um varandi uppihaldsloyvi, eru úr asiatiskum londum eftir at hava verið familjusameind til Føroya. Í fleiri førum verða tær giftar føroyskum manni, flyta til Føroya og fáa sær børn her. Nakrar teirra hava eisini børn frá fyrrverandi parløgum í heimlandinum, og nógv av teimum børnunum flyta til Føroya til mammuna sína seinni.

Treytin fyri at fáa familjusameining er, at umsøkjarin hevur hjúnafelaga ella samlivandi, foreldur ella børn, ið búgva fast í Føroyum. Tann fastbúgvandi kann vera annaðhvørt føroyingur, norðurlendingur ella útlendingur. Útlendingur, sum er familjusameindur, kann søkja um varandi uppihaldsloyvi eftir trý ár í Føroyum, um tann familjusameindi og makin eru samlivandi ella sambúgvandi. Viðkomandi skal heldur ikki vera revsaður ella standa í skuld til tað almenna. Útlendingurin skal harafturat til eina integrasjónssamrøðu á løgreglustøðini, har viðkomandi millum annað skal prógva, at hann ella hon klárar at samskifta á føroyskum ella øðrum skandinaviskum máli. Tað er hesin parturin – integrasjónssamrøðan – sum mælt verður til at strika og seta prógv í føroyskum mál- og samfelagsskeiði ístaðin.

**KVINNUHÚSIÐ**

Kvinnuhúsið hevur javnan útlendskar kvinnur gistandi. Í alt gistu 12 kvinnur í Kvinnuhúsinum í fjør, og fýra teirra vóru útlendskar. Orsøkin er sum oftast, at tær hava verið fyri misbrúki ella harðskapi í hjúnalagnum. Fram til aldarskiftið vóru tað sum oftast grønlendskar kvinnur, sum búðu í Kvinnuhúsinum. Seinastu 20 árini hava tað í høvuðsheitum verið kvinnur úr Asia og Afrika. Tølini fyri gistingar í Kvinnuhúsinum eru viðheft hesum ritinum sum fylgiskjal 1.

Kvinnuhúsið ger vart við, at útlendskar kvinnur, ið gista har, kenna ofta ikki síni rættindi, og eru illa staddar, um maðurin er óvirðiligur og harðligur. Útlendsku kvinnurnar ivast eisini ofta í, um tær megna at standa seg fíggjarliga og sosialt, um tær fara frá manninum, tí maðurin stendur ofta til at eiga allar ognirnar. Úrslitið kann vera, at tær verða verandi í einum hjúnalagi, har tær missa sjálvsálitið, sum eisini ávirkar uppvøksturin hjá børnunum.

Her skal kortini aftur havast í huga, at hetta er ikki galdandi allastaðni, tí størsti parturin av útlendingum í Føroyum trívist væl og hevur góðar karmar at virka og liva í.

**Útlendska arbeiðsmegin í Føroyum**

Útlendingar eru ein lutfalsliga lítil partur av samlaða løntakaraskaranum í Føroyum, umleið fýra prosent. Talvan niðanfyri vísir løntakarar í Føroyum tann 1. februar í ár, býtt á ríkisborgaraskap, sum eru skrásettir at búgva í Føroyum. Talvan niðanfyri vísir, hvussu nógvir útlendskir ríkisborgarar arbeiða í ávísum útvaldum vinnugreinum. *Løntakarar íalt* eru við donskum ríkisborgarum, tað eru føroyingar, danir og grønlendingar.

| | Løntakarar íalt | Norðurlendingar | Aðrir ES-ríkisb. | Aðrir evrop. ríkisb. | Onnur |
|---|---|---|---|---|---|
| Húsarhaldstænastur | **396** | **2** | **12** | **7** | **39** |
| Gistihús | **819** | **6** | **19** | **6** | **74** |
| Bygging | **2.387** | **13** | **165** | **9** | **13** |
| Ali-kryvjivirki | **917** | **8** | **50** | **13** | **72** |
| Fiskavøruídnaður | **1.058** | **8** | **50** | **13** | **117** |
| Landsfyrisiting | **618** | **4** | **2** | | **2** |
| Vinnul. tænastur | **932** | **8** | **19** | **2** | **5** |
| Allar vinnugreinar | **23.449** | **160** | **498** | **97** | **459** |

**Lutfalsliga** eru flestir útlendskir løntakarar í húsarhaldstænastum, tað er reingerðararbeiði, uppvaskiarbeiði, ruskinnsavnan o.l. Eisini eru fleiri í fiskavøruídnaðinum og gistingarhús- og matstovuvinnuni. Gerast skal vart við, at Hagstovan skilir í hesum føri ikki ímillum tey, sum eru í Føroyum við arbeiðsloyvi, familjusameining ella við varandi uppihaldsloyvi.

Bólkurin *Onnur* eru serliga fólk úr Asia og Afrika, og her sæst, at fleiri teirra arbeiða í fiskavøruídnaðinum, gistingarhús- og matstovuvirkinum og á ali- og kryvjivirkjum. Hinvegin er størsti parturin av ES-ríkisborgarum, norðurlendingar undantiknir, í byggivinnuni. Samlaða yvirlitið er viðheft hesari støðulýsingini sum fylgiskjal 3.

Ein løntakari er millum 16 og 74 ár, fær A-inntøku og hevur bústað í tíðarskeiðinum, tá ið lønin verður útgoldin. Sum løntakarar verða tald tey, sum í einum mánaða fáa eina lønarupphædd útgoldna, sum í minsta lagi er ájavnt eina dagløn hjá ófaklærdum arbeiðsfólki. Hetta er uttan mun til, um lønargjaldarin er ein føroysk ella útlendsk fyritøka.




Ábendingar eru um, at nógvir útlendingar eru sum heild viðkvamir á arbeiðsmarknaðinum. Tey vilja illa gera vart við sína ónøgd um lønarviðurskifti, arbeiðsumstøður ella annað, tí tað kann verða skjótt, at tey verða biðin um at fara aftur hagar, tey komu frá. Útlendingar eru av somu orsøk ofta afturhaldnir og laga seg eftir treytunum og umstøðunum, hóast tey í summum førum fáa ov lítla løn ella ikki arbeiða undir sámiligum viðurskiftum. Ábendingar eru eisini um, at lutfalsliga fáir útlendingar í

Føroyum er væl fyri fíggjarliga, og saman við øðrum umstøðum kann tað við tíðini vera við til at økja ójavnan í føroyska samfelagnum. Hetta er vert at kanna nærri í øðrum høpi.

**KABAYAN FAROE ISLANDS**

Kabayan Faroe Islands er ein áhugafelagsskapur, ið roynir at geva fólki úr Filipsoyggjunum, búsitandi í Føroyum, eina felags rødd. *Kabayan* er eitt heiti fyri fólk úr Filipsoyggjunum og merkir *felags landsfólk*.

Tey ásanna avbjóðingina, at nógv hava trupult við at skilja mentanina í Føroyum, men gera samstundis greitt, at karmarnir, korini og umstøðurnar hjá tilflytarum úr Filipsoyggjunum eru sera ymisk. Nøkur trívast sera væl, meðan onnur liva og virka í avbjóðandi umstøðum.

Áhugafelagsskapurin heldur tað vera eitt gott og neyðugt átak at styrkja fráléruna í føroyskum sum fremmandamáli, mentan og samfelagsviðurskiftum. Tey gera kortini vart við, at tað munar lítið at fáa frálæru í føroyskum, um tey ikki sleppa at brúka málið í gerandisdegnum. Tey flestu enda í ófaklærdum og einsligum størvum sum vaskiarbeiði ella á fiskavirki, har tey í sera lítlan mun noyðast at brúka føroyska málið. Tí er neyðugt, at tilflytarar sleppa í størv, har tey brúka málið hvønn dag, so tað verður lættari at læra málið – eisini, so tey verða før fyri at hjálpa børnunum við heimaarbeiði og øðrum.

Somuleiðis ger felagsskapurin vart við, at útbúgvingarnar hjá teirra limum verða at kalla ikki viðurkendar í Føroyum. Sum dømi starvast forkvinnan í Kabayan Faroe Islands sum vaskikona á Glasi og Landssjúkrahúsinum, sjálvt um hon hevur eina BA-útbúgving í løgfrøði.

Fólk úr Filipsoyggjum, sum búgva í Føroyum, vilja fegin skapa sær eina tilveru her. Tey halda føroyska samfelagið vera trygt, friðsælt og sera gott hjá børnum at vaksa upp í. Í heimlandinum livdi meginparturin hinvegin fyri tað mesta við einum støðugum ótta fyri kriminaliteti, vánaligum fíggjarkorum og lítlum møguleikum at smíða sær eina eydnusama tilveru.

Elisabeth Holm, ph.d.-lesandi, skrivar í vísindaligu greinini *'Employers could use us, but they don't: voices from blue-collar workplaces in a northern periphery'* frá mai 2019, at vantandi førleiki í føroyskum, og lutvíst í donskum, saman við vantandi møguleikum at ogna sær hollan málsligan førleika, er største forðingin fyri flytføri og integrasjón á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Hon ger vart við, at væl útbúnir tilflytarar í Føroyum missa fakligar førleikar við í áravís at verða fastlæstir í ófaklærdum størvum, sum t.d. á flakavirkjum og í reingerðarstørvum. Hon ger vart við, at tað, at læra eitt nýtt mál, er heldur ikki bara nakað, ið kemur av sær sjálvum eftir, at tú sum útlendingur fer útlúgvaður heim úr málsliga isoleraðum størvum og tungum fysiskum arbeiði, sum t.d. á flakavirki.

Tilknýtið til arbeiðismarknaðin hevur eisini stóran týdning fyri, at ein tilflytari kann trívast og finna seg tilrættis. Tað er neyðugt, at útlendingar sleppa til arbeiðis at brúka sínar førleikar skjótast tilber, tí avleiðingarnar kunnu vera stórar fyri bæði útlendingin og samfelagið sum heild, um tey hava trupult við at skapa sær eina tilveru her. Arbeiðsgevarar hava sostatt eisini eina ábyrgd at tryggja, at integrasjónin í Føroyum riggar.

## Øðrvísi tilflyting í Føroyum

Evropa hevur verið fyri stórum broytingum seinastu árini, tí útlendingar og tilflytarar, serliga muslimskir tilflytarar, hava verið við til at sett Evropa – teirra millum norðurlond - undir politiskt og

mentanarligt trýst. Tað er eisini ein sannroynd, at nógvir tilflytarar hava havt trupult við at tillaga seg umstøðurnar og mentanina í Evropa. Av somu orsøk hevur ein illvilji tikið seg upp ímóti tí fremmanda í ávísum samfelagsbólkum, og atfinningarsamar politiskar rørslur hava eisini vunnið fram, sum vilja seta týðiliga krøv til inklusjón og eksklusjón.

Tað er umráðandi at hava í huga, at í Føroyum er tilflytingin munandi øðrvísi enn í øðrum norðurlondum og evropeiskum londum annars. Í Føroyum eru tilflytarar eitt lutfalsliga nýtt fyribrigdi, og her er eitt gott útgangsstøði at integrera útlendingar í samfelagið, tí flestu útlendingar, sum vilja búgva og skapa sær eina tilveru í Føroyum, hava frammanundan eitt ávíst tilknýti til Føroya, tí tey eru gift føroyingi, hava arbeiði ella koma higar at íðka ítrótt. Bara tvey prosent av teimum, sum búðu í Føroyum tann 1. januar 2019, hava ríkisborgarskap í londum uttanfyri Evropa. Við tilflytarum úr Evropa, norðurlondum undantikin, er 3,8 prosent av fólkatalinum í Føroyum úr øðrum londum. Tað vil siga, at í Føroyum er væl færri tilflytarar enn í grannalondunum.

Yvirlitið niðanfyri vísir, hvussu stórur partur av samlaða fólkatalinum í øðrum norðurlondum vóru tilflytarar og børn hjá tilflytarum við ársbyrjan 2018. Tølini eru frá DST Analyse og vóru útgivin tann 26. mars 2019. Tað vil siga, at í Føroyum er væl færri tilflytarar enn í grannalondunum.

Gerast skal vart við, at í Danmark, Svøríki og Norra eru gott og væl helmingurin av tilflytarunum og eftirkomarum úr Afrika og Asia, meðan útivið 80 av tilflytarunum í Íslandi eru úr øðrum norðurlondum, ES-londum og øðrum evropeiskum londum:

| **Danmark** | **Tal av fólki** | **Tal í prosentum** |
|---|---|---|
| Fólkatal | 5.758.769 | 100 |
| Tilflytarar | 568.667 | 10 |
| Eftirkomarar | 168.107 | 3 |
| Restin av íbúgvunum | 5.011.085 | 87 |

| **Svøríki** | **Tal av fólki** | **Tal í prosentum** |
|---|---|---|
| Fólkatal | 9.995.153 | 100 |
| Tilflytarar | 1.687.597 | 17 |
| Eftirkomarar | 535.095 | 5 |
| Restin av íbúgvunum | 7.772.461 | 78 |

| **Norra** | **Tal av fólki** | **Tal í prosentum** |
|---|---|---|
| Fólkatal | 5.258.317 | 100 |
| Tilflytarar | 724.987 | 14 |
| Eftirkomarar | 158.764 | 3 |
| Restin av íbúgvunum | 4.374.83 | 83 |

| **Ísland** | **Tal av fólki** | **Tal í prosentum** |
|---|---|---|
| Fólkatal | 338.349 | 100 |
| Tilflytarar | 35.997 | 11 |
| Eftirkomarar | 4.473 | 1 |
| Restin av íbúgvunum | 297.879 | 88 |

## 4. SKYLDAN AT SAVNA

Útlendingar, ið vilja vera fastbúgvandi í Føroyum, skulu beinanvegin hava møguleika at skapa sær eina tilveru, sum samsvarar við teirra evnir og førleikar. Tað krevur, at Føroyar sum samfelag setur ávís krøv til, at ein tilflytari skal integrerast. Eitt landsumfevnandi mál- og samfelagsskeið verður mett besta einstaka amboðið at røkka hesum.

Integrasjón snýr seg í høvuðsheitum um at savna fleiri partar í eina eind. Í Føroyum skal integrasjónspolikkurin vera við til at taka útlendingar inn í samfelagið og samstundis hava atlit at okkara samfelag. Integrasjón krevur sostatt felags tøk. Sum samfelag skulu vit laga okkum til øðrvísi uppgávur, meðan tilflytarin skal vera opin og forvitin og taka fyrilit fyri føroyskari siðvenju og mentan, og samstundis sleppa at vera sín egin og liva eftir sínum siðum, um tað ikki er í stríð við verandi lóggávu ella grundleggjandi virði í føroyska samfelagnum.

**GIGNI**

Gigni kennir avleiðingarnar av, at summir útlendingar ikki duga føroyskt og ikki hava innlit í føroyska mentan og samfelagsviðurskifti. Tey hitta av og á útlendingar, sum ikki skilja føroyskt, ikki eru kring í enskum og ikki kenna føroyska samfelagsbygnaðin. Gigni ger samstundis vart við, at flestu útlendingarnir í Føroyum eru tykjast væl skipaðir og at trívast væl.

Stórur partur av útlendingum eru frá sínum upphavi ikki vanir við at hava samband við almennar myndugleikar. Summir útlendingar uppfata Gigni sum ein strangan eftirlitsmyndugleika. Starvsfólk hjá Gigni brúka av somu orsøk nógva orku at greiða teimum frá, at Gigni er er eitt tilboð til allar barnafamiljur, og tað er ein vegleiðandi myndugleiki, ið einans vil menna børn og fyribyrgja møguligari skeivari menning av børnum. Heilsufrøðingar hjá Gigni uppliva eisini, at summi útlendsk foreldur hava øðrvísi tilgongd til barnauppaling, enn vit eru von við í Føroyum. Gigni vegleiðir teimum, hvat er gott fyri børnini, t.d. at brúka meira tíð saman við børnunum, tosa meira við tey, tosa sítt móðurmál o.a. Eisini verður gjørt vart við, at tað er ikki loyvt at sláa síni børn. Heilsufrøðingurin roynir altíð at seta seg í teirra støðu fyri at vita, hvat hevur týdning fyri tey sum foreldur. Í nógvum førum er teirra máti kanska eisini betri enn okkara.

Eitt ítøkiligt dømi um, at misskiljingar kunnu skjótt uppstanda, er, at ein útlendsk mamma fór við barninum í barnagarð hvønn morgun klokkan 7.30 stundisliga, og heintaði barnið klokkan 17.00 seinnapartin. Eftir rúma tíð mettu starvsfólkini, at tað var best, at barnið ikki var so nógvar tímar á stovninum. Tey vendu sær til mammuna, sum var bæði bilsin og hørm, tí hon helt tað vera krav, at barnið var í barnagarði, meðan hann var opin, tí hon hevði upplatingartíðirnar sum møtitíðir og heintingartíðir.

Sambært Integrasjónsálitinum frá 2011 er semja um, at hugtakið integrasjón fevnir um fyribrigdið, at einstaklingurin og samfelagið skulu lagað seg hvørt eftir øðrum. Tað verður skilmarkað soleiðis:

*Tað hevur stóran týdning, at integrasjónin fer fram við fyriliti fyri føroyskari og útlendskari siðvenju og mentan soleiðis, at útlendingurin ikki missir sín samleika.*

Uppgávan er at finna eina hóskandi javnvág. Tað eigur at vera soleiðis, at tilflytarin leggur stóra orku í at finna seg til rættis, meðan samfelagið gevur teimum bestu karmar at virka í. Sum samfelag eiga vit í øllum førum at vænta av útlendingum, at tey vilja integerast og vilja virða føroyska fólkaræðisliga grundarlagið, føroyska mentan og føroysku samfelagsskipanina.

Tað er sera trupult – um ikki ómøguligt – at skilgreina, nær ein tilflytari er ein integreraður partur av einum samfelag, tí hugtøk sum tørvur, trivnaður og álit eru víðfevnd hugtøk, ið vit sum einstaklingar

kunnu tulka og fata ymiskt. Men treytin eigur í øllum førum at vera, at ein tilflytari ger sítt fyri at vera virkin í samfelagslívinum, serliga á arbeiðsmarknaðinum. Tilflytarar eru fólk við skapandi gávum, og tey hava sum øll onnur rætt og skyldu til at vera við til at menna samfelagið, tey eru partur av. Sum samfelag eiga Føroyar at sýna teimum virðing og bæði vænta og virðismeta teirra íkast.

Søguliga hava nógvir útlendingar verið føroyska samfelagnum ein virðismikil vinningur í nógvum samfelagsliðum, og verður rætt atborið, kunnu enn fleiri tilflytarar verða eitt virðismikið tilfeingi í Føroyum. Eitt samfelag, sum ikki tekur nakað øðrvísi og fremmant til sín, kann skjótt stirðna í øllum lutum, og ymiskleiki er eitt amboð til at skapa eitt betri, rúmligari og meira framkomið samfelag, so okkara sjónarringur rúmkar og virknið í samfelagnum økist til stóran fyrimun fyri okkum øll. Útlendingar, sum duga føroyskt og hava góðar sosialar umstøður annars, geva okkum øllum størri møguleikar at fáa ágóðan av teirra royndum, hugsanum og førleikum. Og tað er neyðugt, at teirra røddir verða hoyrdar í samfelagnum. Tey, ið koma uttanifrá, kunnu seta spurningar við okkara sjálvsfatan og gera vart við viðurskifti, vit vanliga ikki gáa um.

Grundreglan í okkara vælferðarsamfelag er, at allir borgarar hava somu rættindi og skyldur. Tá ið Føroyar sum samfelag lata útlendingum eitt varandi uppihaldsloyvi, fylgir ábyrgd eisini við. Tað er ein skylda at taka sær væl av útlendingunum, júst sum vit hava skipanir og mannagongdir at stimbra og taka sær av øðrum, ið hava tað fyri neyðini. Okkara vælferðarskipan vil í sínum útgangsstøði virka fyri, at tín sosiala bakrund eigur at hava minst møguliga ávirkan á tínar møguleikar at skapa eina góða og virðiliga tilveru. Í hesum føri inniber tað millum annað at geva útlendingum møguleika at læra føroyskt og soleiðis gerast ein partur av samfelagnum, og strembast skal eftir, at útlendingar á jøvnum føti við føroyingar kunnu fáa sær útbúgving, virka í vinnulívinum, politikki, mentanarlívinum og aðrastaðni. Tað gerst best við einum skipaðum undirvísingartilboði, tí við føroyska málinum og innliti í føroysk samfelagsviðurskifti og mentan verður heilt einfalt lættari hjá útlendingum at skapa sær eina góða tilveru í Føroyum og fáa breiðari atgongd til arbeiðsmarknaðin.

**TEILENDSKAR KVINNUR Í FØROYUM**

Ivan Hentze Niclasen hevur masterútbúgving í integrasjón og skrivaði í 2015 serritgerð um teilendskar kvinnur í Føroyum við heitinum *"De thailandske ægteskabsmigranter på Færøerne."* Hann var í sambandi við 39 teilendskar kvinnur, sum eru giftar føroyskum manni og eru fluttar til Føroya at búgva. Nakrar av høvuðsniðurstøðunum í serritgerðini vóru, at:

- 14 teirra vistu einki um Føroyar, tá ið tær komu higar. Hinar fingu okkurt smávegis at vita frá føroyska manninum og á internetinum.
- 25 teirra vilja viðmæla øðrum teilendskum kvinnum at flyta til Føroya, sum tær halda vera eitt gott og trygt samfelag.
- Bara 11 teirra halda, at føroyskir menn eru dámligir og fryntligir.
- Meginparturin sendi pengar úr Føroyum til familjuna í Teiland
- Mest sum allar tær teilendsku kvinnurnar halda saman í frítíðini, og fáar teirra hava føroysk vinfólk og eru til føroysk tiltøk
- Teilendskar kvinnur í Føroyum hava ein bólk á Facebook, har tær samskifta um millum annað vantandi kryddarí í føroyskum handlum, illsliga veðrið, starvslýsingar eftir fólk innan matgerð, reingerð, fiskaarbeiði og handils- og hotelvirksemið, og at gerandisvørur eru ov dýrar í Føroyum.

Integrasjón fer fyrst og fremst fram á arbeiðsmarknaðinum, í grannalagnum, og í felagskapum. Samskiftið – í hesum føri føroyska málið – er sterkasta amboðið at skapa sosial sambond og byggja brýr millum fólk, mentanir og fatanir. Tað er givið, at tilflytarar, ið ikki hava nøktandi málførleika, hava torført við at fata ymsu nuansurnar í føroyska málinum. Føroyska málið verður brúkt í nógvum høpum á arbeiðsplássum og í vanligum samskifti annars, og orðavalið og orðaljóðið er ymiskt, alt eftir um vit samskifta um gerandisviðurskifti, geva øðrum boð, hava áheitanir, mæla til, umbera, ella brúka humor og ironi. Skilur tilflytarin ikki ymiskleikan í málinum, og føroyingar sum heild ikki eru varugir við tað og ikki tillaga sítt málbrúk, kunnu skjótt misskiljingar, mistrúgv, mótvilji, óvissur og samstarvstrupulleikar standast av tí. Úrslitið kann verða, at grannar ella arbeiðsfelagar, føroyingar og útlendingar, koma sær undan hvør øðrum, og tað er ein bági fyri integrasjónina.

**EIÐIS KOMMUNA**

Í Eiðis kommunu hava tey fingið munandi fleiri útlendingar í kommununa seinastu 20 árini. Ein uppteljing hjá Eiðis skúla vísir, at omanfyri 20 prosent av næmingunum hava eitt ella tvey útlendsk foreldur. Meginparturin eru kvinnur úr Filipsoyggjunum, men har eru eisini kvinnur og menn úr øðrum londum, bæði úr Evropa og aðrastaðni. Flestu børnini tykjast trívast væl, tey flestu duga føroyskt, tí tey eru fødd og uppvaksin í Føroyum og hava vinfólk, sum tosa føroyskt.

Mentanarligar avbjóðingar eru kortini. Starvsfólk í bæði dagstovninum og skúlanum á Eiði hava í fleiri førum kent seg noydd at siga útlendsku foreldrunum, hvat føroyingar halda vera sømiliga barnauppaling, og hvat er ein heilsugóður matpakki o.l.

Annars tykjast trívast útlendingar væl. Tey eru sera arbeiðssom, og fleiri hava tvey arbeiði. Útlendingarnir halda nógv saman, og fleiri hava luttikið á kvøldskúlaskeiðnum í føroyskum í bygdini.

Tilknýtið til arbeiðsmarknaðin og góð fíggjarviðurskifti eru eisini ein avgerandi táttur fyri, at tú sum einstaklingur trívist. Duga útlendingar føroyskt, kunnu fleiri teirra í øðrvísi mun luttaka á arbeiðsmarknaðinum, tí málførleikar í føroyskum geva í størri mun atgongd til arbeiði, sum krevur beinleiðis samskifti við borgaran. Í Føroyum er støðan nú í stóran mun, at nógvir fastbúgvandi útlendingar, sum vilja skapa sær eina tilveru her, kappast sína millum um ófaklærd og einslig størv sum vaskiarbeiði, goymsluarbeiði og flutningsarbeiði.

**Skulu seta krøv**

Fleiri orsøkir eru til, at avgerandi fortreytin fyri integrasjón í Føroyum er, at útlendingar hava kunnleika til føroyska málið og samfelagsviðurskifti. Av teirri orsøk skulu krøv eisini setast teimum

**BARNAVERNDIN**

Barnaverndin hevur lutvíst nógv mál við børnum hjá útlendingum. Eingi skrásett og almenn hagtøl eru, men tað verður leysliga mett, at í ávísum økjum snýr ein stórur partur av barnaverndarmálum seg um børn hjá útlendingum. Í øðrum økjum eru tað okkurt um 10 prosent, og í øðrum økjum eru eingi barnaverndnarmál við útlendskum foreldrum.

Barnaverdnarmálini eru ymisk. Summi børn verða vanrøkt, onnur eru fyri harðskapi, meðan í øðrum førum hevur Barnaverndin mett, at børnini, serliga gentubørn, fáa ov stóra ábyrgd heima við hús ov tíðliga. Tað er millum annað at ansa yngri systkjum, keypa inn, halda hús o.a., meðan foreldrini eru til arbeiðis. Dømi er eisini um, at føroyski maðurin siglir, meðan útlendska mamman er heima og ansar børnunum, sum ikki mennanst málsliga ella sosialt. Í teimum førum leggur Barnaverndin eisini uppí.

útlendingum, sum vilja búgva og virka her, tí avleiðingarnar av miseydnaðari integrasjón eru eisini stórar, bæði fyri einstaka útlendingin og samfelagið sum heild.

Sum útlendingur kann tú kenna teg sosialt avbyrgdan, um tú hevur trupult við at finna teg tilrættis og ikki skilja tað, sum hendir í nærumhvørvinum. Tað er bæði í mun til vanliga prátið á arbeiðsplássum, føðingardøgum, tíðindasendingum og stóra samfelagnum sum heild. Tú kann hava trupult við at geva títt íkast og gagnnýta tínar skapandi arbeiðsførleikar. Mistrivnaður og sosial avbyrging kann í ringasta føri elva til, at tú endar á samfelagsins skuggasíðu, tí vantandi útbúgving og førleikar ávirka tínar arbeiðsmøguleikar, inntøku, sosiala netverk, virði, búseting o.a. Tað fer við vissu at seta almennu skipanirnar undir størri trýst enn neyðugt, tí persónligur mistrivnaður kann elva til verri heilsustøðu, verri útbúgving, og skerdar arbeiðsmøguleikar. Avleiðingin verður enn størri, um útlendingurin hevur børn, í ringasta føri, at børnini fáa ikki tryggar umstøður at vaksa upp í, og ov lítlan stuðul og hjálp til at standa seg í skúlanum og at fáa tey virði, sum hoyra føroyska samfelagnum til.

Ein fólkafrøðilig ójavnvág kann eisini skjótt standast av ótamdari innflyting, og tað er eitt vandamál, ið vit sum samfelag skulu taka í størsta álvara. Við persónligum mistrivnaði kann sosiali ójavnin og stættarmunurin økjast, sum í ringasta føri kann darva búskaparligum vøkstri, almannaheilsustøðuna og máa undan fólkaræðisliga hugburðin í samfelagnum. Avleiðingin er í ringasta føri versnandi álit millum samfelagsbólkar, størri arbeiðsloysi, meira kriminalitetur og búskaparlig niðurgongd.

Álit er ein avgerandi liður í okkara samfelag. Álit ávirkar okkara hugburð til felagsskapin, politisku skipanina, skipanir sum at rinda skatt og viljan at taka felags tøk. Sum samfelag skulu vit javnt og samt royna at bróta niður múrar, illgitingar og fordómar og møta hvørjum øðrum – í hesum føri tilflytarum - við opnum sinni, so savningarmegin verður styrkt. Júst samfelagsliga savningarmegin verður bjóðað av, tá ið fólk í Føroyum liva og virka avbyrgd frá nærumhvørvinum, serliga nú nógvir útlendingar í Føroyum eru uppvaksin í londum við lutvíst veikari savningarmegi, har álitið millum samfelagsbólkar er lítið, og har almennir myndugleikar og tænastur eru fjar hugtøk.

**HEILSUVERKIÐ**

Summir útlendingar hava eftir øllum at døma avbjóðingar við heilsuverkinum, sum hevur trupult við at tillaga seg vaksandi uppgávurnar at viðgera útlendingar.

Ábendingar eru um, at fleiri tilflytarar kenna seg misskiltar í sjúkrahúsverkinum. Útlendingar halda, at starvsfólk í føroyska heilsuverkinum tosa og viðgera útlendingar, sum vóru tey føroyingar. Tað er ein avbjóðing, tí útlendingar hava tørv á øðrvísi kunnandi viðferð enn føroyingar fyri at skilja sína egnu heilsustøðu. Dømi eru eisini um útlendingar, sum fara á sjúkrahúsið, men verða vend í hurðini og biðin um at ringja til læknavaktina ístaðin. Tað elvir til óneyðugar misskiljingar. Dømi eru eisini um útlendingar, sum treyðugt fara til lækna, tí tey halda, at tað kostar.

Við hesum í huga eiga Føroyar sum samfelag at hava áhuga í, at útlendingar finna seg væl til rættis. Tað er ein sannroynd, at í teimum evropeisku samfeløgum, har integrasjónin ikki riggar, verða tey fremmandu – serliga tey, sum ikki eru úr vestanlondum - koyrd í bás og mett sum ein hóttan, bæði mentanarliga og á arbeiðsmarknaðinum. Við hesum verða negativar fatanir og mýtur skaptar um tey fremmandu (Gaini, 2008). Tey verða mett sum ein útreiðsla, og ikki sum tilfeingi, og spentar støður kunnu skjótt íkoma. Av somu orsøk ræður hinvegin um at gagnnýta hetta tilfeingið, sum útlendingar eru.

Í stuttum kann sigast, at:

- Í Føroyum skal integrasjónspolikkurin vera við til at taka útlendingar inn í samfelagið og samstundis hava atlit at okkara samfelag, okkara mentan og okkara virðum.
- Tilflytarar hava sum øll onnur rætt og skyldu til at vera við til at menna samfelagið, tey eru partur av. Tað krevur, at samfelagið gevur teimum neyðugu amboðini, í hesum føri at læra føroyska málið og fáa innlit í føroysk samfelagsviðurskifti.
- Útlendingar, ið mistrívast og eru sosialt avbyrgdir, kunnu í ringasta føri enda á samfelagsins skuggasíðu við verri heilsustøðu, verri útbúgving, og skerdum arbeiðsmøguleikum. Tað fer eisini at merkja uppvøksturin hjá børnunum, og seta almennu skipaninar undir trýst.

## 5. ÁTØK AT FREMJA

Við støði í hesum verður mælt til 11 politisk átøk at fara undir skjótast tilber.

Sum greitt frá í innganginum, skulu átøkini skiljast sum fyrsti liður av eini størri integrasjónslóg, ið skal mennast og dagførast við tíðini. Í Føroyum skal eisini áhaldandi stýrast eftir fleiri integrasjónstiltøkum og ábøtum, alt eftir, hvussu átøkini hilnast. Niðanfyri verða átaksøkini og tilmælini útgreina.

**1. Tillaga treytirnar fyri varandi uppihaldsloyvi**
*Mælt verður til seta sum krav fyri at fáa varandi uppihaldsloyvi, at viðkomandi tilflytari hevur lokið prógv í føroyskum mál- og samfelagsskeiði.*

Eingin krøv verða sett útlendingum, sum koma til Føroya, at teir skulu læra seg føroyskt ella hava havt ávísa frálæru í føroyskum máli og samfelagsviðurskiftum. Tað er heldur ikki krav, at útlendingar skulu luttaka á málskeiði.

Sum støðan er nú, kann útlendingur, ið er familjusameindur, søkja um varandi uppihaldsloyvi eftir trý ár í Føroyum. Treytirnar, ið verða settar, eru, at tann familjusameindi og makin skulu vera samlivandi ella sambúgvandi, vðkomandi skal ikki vera revsaður og ikki skylda tí almenna nakað.

Útlendingur, ið er í Føroyum við arbeiðs- og uppihaldsloyvi, kann søkja um varandi uppihaldsloyvi eftir sjey ár í Føroyum. Treytirnar, ið settar verða fyri at fáa varandi uppihaldsloyvi, eru, at viðkomandi skal hava eitt arbeiðstilboð, ikki vera revsaður og ikki hava skuld til ta almenna.

Útlendingurin skal harafturat til eina intregrasjónssamrøðu á løgreglustøðini, har viðkomandi m.a. skal prógva, at hann ella hon klárar at samskifta á føroyskum ella á øðrum skandinaviskum máli, sum viðkomandi klárar seg við í Føroyum, og at hann annars er virkin í samfelagnum.

Mælt verður til at strika hendan seinasta partin, integrasjónssamrøðuna á løgreglustøðini, og seta prógv í føroyskum mál- og samfelagsskeiðið sum treyt ístaðin. Integrasjónsbólkurin, ið skrivaði integrasjónsálitið í 2011, mælti eisini til, at ein útlendingur bara kann fáa varandi uppihaldsloyvi, um viðkomandi hevur staðið prógvtøku í føroyskum máli og føroyskum viðurskiftum. Kravið verður einans sett teimum, sum skulu hava varandi uppihaldsloyvi, og ikki teimum, sum longu hava fingið varandi uppihaldsloyvi.

Broytingin í útlendingalógini, sum varð samtykt í løgtinginum tann 2. mai 2019, leggur upp til, at:

*"Stk. 9. Udlændinge- og integrationsministeren kan efter forhandling med det færøske landsstyre fastsætte nærmere regler om, at tidsubegrænset opholdstilladelse på Færøerne betinges af, at den pågælgende udlænding har en integrationsrelevant tilknytning til Færøerne."*

Mælt verður til, at landsstýrismaðurin tekur upp samráðingar við donsku stjórnina um hetta, men orsaka av, at undirvísingarskipanin í føroyskum sum fremmandamáli ikki er liðug ment, skal kravið fráboðast við ávísari freist fyri at skunda undir tilgongdina, so undirvísingartilboðið fæst í fasta legu skjótast tilber.

Tað verður mett órímiligt at krevja, at tey, sum eru í Føroyum við einum fyribils arbeiðsloyvi- og uppihaldsloyvi eitt avmarkað tíðarbil, skulu luttaka í undirvísingini. Tey skulu kortini eggjast til tað.

**2. Fyrireika eitt skipað innleiðsluskeið**
*Mælt verður til at sum skjótast at fyrireika eina námsætlan til eitt landsfevnandi innleiðsluskeið í føroyskum sum fremmandamáli og samfelagsviðurskiftum til vaksin.*

Mentamálaráðið hevur í vár sett ein bólk við fólki at endurskoða og dagføra verandi námsætlan fyri føroyskt sum fremmandamál, so hon í størri mun samsvarar við altjóða CEFR-skipanina. Gongst sum ætlað, fer bólkurin undir arbeiðið í heyst, har krøv og ásetingar um tímatal, innihald, progressión og próvtøkur verða fastløgd. Hetta er ábyrgdarøkið hjá Mentamálaráðnum.

Verandi námsætlan frá 2014 er ikki løggild og lýst sum galdandi, og kvøldskúlar um landið hava mest brúkt hana sum íblástur. Kvøldskúlar um landið hava í nøkur ár boðið tilflytarum undirvísing í føroyskum sum fremmandamáli, men úrslitini vísa, at tað gongur misjavnt hjá útlendingum at læra føroyskt. Sjálvt um hesi tilboðini hava verið røtt og umráðandi stig at tikið, so nøkta hesi als ikki tann tørvin, sum er, tí góðskan á skeiðunum er sera ymisk. Mest sum allastaðni, kanska uttan í Tórshavn, er frálærustøðið skiftandi innihaldsliga og fevnir sum heild um ov fáar tímar. Tað er neyðugt at fáa hetta í fasta legu.

Enduskoðaða námsætlanin skal eftir ætlan býtast í seks torleikastig – seks modul. Mannagongdin verður, at ein útlendingur, ið meldar seg til undirvísing, verður kannaður fyri at finna tað stigið, sum hóskar hansara ella hennara málførleika best. Við øðrum orðum nýtast øll ikki at byrja á fyrsta stigi.

Hvørt modul verður skipað soleiðis, at tað endar við eini próvtøku, har útlendingur skal prógva, at hann ella hon hevur lært tað, ið hvørt modul ásetur. Talið av vikum fyri hvørt modul niðanfyri er kopierað úr Danmark. Komandi námsætlanin í føroyskum sum fremmandamáli fer at nágreina hesi viðurskiftini.



Tá ið námsætlanin er klár, mælir Mentamálaráðið til, at hon verður royndarkoyrd í okkurt um tvey ár, áðrenn krøv um varandi uppihaldsloyvi verða tengd at hesari skipanini. Tað er fyri at vissa sær, at undirvísingin og próvtøkurnar eru so væl frágingnar sum møguligt.

Ásannandi, at tað ikki altíð er nóg mikið at læra seg føroyskt, tí førleiki í donskum eisini er ein fortreyt á fleiri arbeiðsplássum, eigur í hesum arbeiðinum at vera mett um, í hvønn mun útlendingar í Føroyum eiga at læra seg danskt, og um undirvísing í donskum sum fremmandamáli í ávísan mun skal samskipast við undirvísingina í føroyskum sum fremmandamáli.

**3. Samantvinna frálæru í føroyskum máli og samfelagsviðurskiftum við starvsvenjing**
*Mælt verður til at kanna møguleikarnar fyri, at útlendingur kann fáa frálæru í føroyskum máli og samfelagsviðurskiftum og samstundis taka eina fakliga útbúgving*

Í grannalondunum eru fleiri skipanir til útlendingar at læra málið. Flestu skipanirnar eru knýttar at arbeiðsmarknaðinum, og hetta eiga vit í Føroyum eisini at stremba eftir. Tað vil siga, at útlendingar kunnu læra málið og hava tilknýti til arbeiðsmarknaðin samstundis.

Sum dømi stendur tilflytarum í boði at taka eina stutta útbúgving innan eldrarøkt, dagstovnaøki, ferðavinnuna og byggivinnuna, samstundis sum tey eru knýtt at einum mál- og samfelagsskeiði.

Í Álandi verður hetta skipað soleiðis, at yrkisnám samantvinnar ymiskar útbúgvingar, serliga innan ferðavinnuna, við svenskum sum fremmandamál. Fremsta orsøkin er, at Álandi vantar arbeiðsmegi innan ferðavinnuna, gistingarhús – og matstovuvinnuna. Soleiðis fáa útlendingar bæði eina fakliga barlast sum kokkur ella annað og læra seg svenskt.

Í Danmark bjóða tey Integrationsgrunduddannelsen, sum er ein tvey ára útbúgving, har tilflytarin er í starvsvenjing 37 tímar um vikuna, og skal í skúla at læra um mál, mentan og samfelag í 20 vikur í alt. Kommunurnar hava saman við jobcentrum ábyrgdina at finna tilflytarum eitt arbeiðspláss. Í Herning eru tey í holt við eina royndarverkætlan, har tilflytarar starvast innan eldraøki, tí kommununi vantar arbeiðsmegi á eldraøkinum. Í hesum føri fær tilflytarin eisini eina fakliga barlast og lærir danska málið, mentan og samfelagsviðurskifti.

Í Føroyum vantar nú arbeiðsmegi innan ferðavinnuna, byggivinnuna, eldraøkið og dagstovnaøkið. Tí verður mælt til at kanna møguleikarnar fyri at skipa fakligar útbúgvingar til tilflytarar, sum bæði geva teimum eina fakliga barlast og samstundis eina frálæru í føroyskum máli, mentan og samfelagsviðurskifti. Hetta kann eisini gevur teimum møguleika at útbúgva seg víðari. Við hesum fær føroyski arbeiðsmarknaðurin skikkaða arbeiðsmegi, og útlendingar verða í størri mun javnstillaðir við aðrar borgarar í samfelagnum.

Sum dømi kundi ein útlendingur lært til heilsuhjálpara. Tað tekur eitt ár og tríggjar mánaðirnar nú. Verður føroyskt sum fremmandamál og frálæra í mentan og samfelag, lagt afturat, kann útbúgvingin taka tvey ár. Byrjað verður í august við einum hálvt ára skeiði í føroyskum sum fremmandamáli, mentan og samfelagsviðurskiftum, 28 tímar um vikuna í 20 vikur. Við støði í álendsku skipanini, fáa tey frálæru í føroyskum sum fremmandamál 25 tímar um vikuna, og í mentan og samfelag tríggjar tímar um vikuna. Eftir jólafrítíðina skal tilflytarin verða helvtina av tíðini í skúla, og hina helvtina til arbeiðis – 20 tímar um vikuna til arbeiðis á einum arbeiðsplássi innan eldraøkið, og 20 tímar í skúla at fáa frálæru í føroyskum sum fremmandamáli í 24 vikur. Við hesum hevur tilflytarin fingið frálæru

í føroyskum sum fremmandamáli á B1-stigi, og hevur fingið 12 vikur av starvsvenjing sum heilsuhjálpari. Eftir tað fer tilflytarin undir vanligu heilsuhjálparaútbúgvingina.

Roknað verður við, at tað kann vera ein forðing fyri nógvar tilflytarar, um skúlagongdin einans verður í Suðuroy. Mælt verður tí til, at fjarundirvísing verður partur av skipanini.

**4. Ein skúli skal standa fyri undirvísingini**
*Mælt verður til at skipa ein skúla við lærarum í føstum starvi at skipa fyri mál- og samfelagsskeiði.*

Ásannandi, at talan er um eitt lítið fakøkið, ið krevur servitan, er umráðandi at savna orkuna innan økið á einum og sama stað. Mælt verður til at gera ein skúla undir Mentamálaráðnum við trimum ella fýra undirvísarum í føstum starvi, ið skulu undirvísa tilflytarum í føroyskum sum fremmandamáli. Skúlin skal vera staðsettur á einum stað, har tað er lætt hjá flest møguligum at fara í skúla. Fjarundirvísing skal eisini vera fastur partur av undirvísingini.

Við trimum ella fýra fólkum í føstum starvi ber til at skipa fyri fjølbroyttum skeiðum, har hædd verður tikin fyri, at bólkurin av tilflytarum eru fjølbroyttur og hevur ymiskan tørv. Eisini hevði borið til at skipa fyri skeiðum ymiskar tíðir á degnum, fyrrapartin, seinnapart og um kvøldið. Skeiðini kunnu bæði vera við nógvum tímum um vikuna í fáar vikur, ella færri tímun um vikuna í fleiri vikum.

Raksurin av einum slíkum skúla við undirvísarum og skrivstovufólki kostar millum 2,5 og 3 milliónir krónur um árið, her eru hølisviðurskifti ikki íroknað. Havast skal í huga, at játtanin til kvøldskúlarnar kring landið fyri undirvísing til í føroyskum sum fremmandamáli fella í útgangsstøðinum burtur.

Hin møguleikin er, at tað skal vera álagt øllum kommunum at skipa fyri innleiðsluskeiðnum, og kommunan kann fara í alment ella privat samstarv fyri at skipa undirvísingina. Tað vil siga, at kommunur kunnu eisini samstarva og býtast um uppgávuna at skipa fyri skeiðnum. Við komandi undirsjóvartunlum kundi verið mett hóskandi at skipa tilboðið í trimum støðum um landið fyri at savna førleikarnar og tilfeingi sum best. Tað kundi tildømis verið í Norðoyggjum, Tórshavn og Suðuroy. Semja skal frammanundan vera um eina høvuðsfyrisitingareind av pørtunum, ið ganga inn í eitt samstarv. Mentamálaráðið skal hava eftirlit við, at krøvini fyri undirvísingina verða fylgd.

Kommunan kann sostatt skipa fyri undirvísingini, sum tekur støði í námsætlanini í føroyskum sum fremmandamáli og hava eitt umhvørvi til at læra í, har neyðug læruamboð eru til taks at brúka.

Sum er játtar Mentamálaráðið kommunum stuðul til virksemið í kvøldskúlum við grundarlagi í innsendum umsóknum. Kommunurnar rinda lønina hjá lærarum og leiðarum, og góðkenna einstøku skeiðini, men endurgjaldið er 100 prosent fyri serstaka frítíðarundirvísing, har næmingar fáa lokið prógv. **Samlaða** rakstrarjáttanin til **alt** frítíðarundirvísingarøkið var 6.414 mió. kr. í 2019.

**5. Eftirútbúgva undirvísarar**
*Mælt verður til sum skjótast at førleikamenna lærarar at undirvísa í føroyskum sum fremmandamáli og samfelagsviðurskiftum og somuleiðis fáa eina dygdargóða eftirútbúgving í fasta legu.*

Tað er ein serlig støða at undirvísa fremmandamæltum. Lærarin skal duga bæði føroyskt og onnur mál, sum eru viðkomandi fyri samskiftið, og somuleiðis duga at leggja undirvísingina til rættis við atliti at førleikanunum hjá einstaka næminginum.

Ásannandi, at tað er ein serlig undirvísingarstøða at undirvísa fremmandamæltum, eigur sum skjótast at vera farið undir at førleikamenna lærarar at undirvísa í føroyskum sum fremmandamáli. Einstøk

førleikamennandi skeið eru skipað í samstarvi við Fróðskaparsetur Føroya fyri teimum, sum undirvísa vaksnum tilflytarum. Hetta er ábyrdarøkið hjá Mentamálaráðnum, sum saman við Fróðskaparsetrinum er farið at meta um kostnaðin at fáa eina skipaða eftirútbúgving stovnaða.

Aðrastaðni er ikki óvanligt, at útlendingar eisini undirvísa útlendingum. Í hesum føri vil tað siga, at útlendingur, ið er kringur í føroyskum máli, undirvísir útlendingum í Føroyum í føroyskum sum fremmandamáli. Fyrimunurin er, at útlendskir undirvísarar fáa eitt øðrvísi trúnaðarsamband við næmingarnar, tí sum útlendingur heldur tú teg kanska aftur at spyrja um samfelagsviðurskifti og annað, tú heldur vera undrunarsom. Við støði í góðu royndunum aðrastaðni verður mælt til at kanna møguleikarnar fyri at fáa útlendingar, sum eru kønir í føroyskum, at undirvísa í føroyskum sum fremmandamáli.

**6. Gera undirvísingartilfar**
*Mælt verður til at skunda undir arbeiðið at gera dygdargott undirvísingartilfar, sum skal brúkast til innleiðsluskeiðið.*

Ein treyt fyri at fáa eitt skipað innleiðsluskeið er, at dygdargott undirvísingartilfar er tøkt, og skundast skal undir at fáa neyðuga undirvísingartilfar til vega. Fyri at tillaga treytirnar um varandi uppihaldsloyvi og fara undir skipaða undirvísing er alneyðugt, at tilfar er tøkt.

Undirvísingartilfar skal framleiðast til øll stig í skúlaskipanini. Bergljót av Skarði, sum hevur undirvíst útlendingum, hevur eisini givið út undirvísingartilfar til byrjanarundirvísing fyri útlendingar, og fleiri lærarar, sum hava undirvíst í kvøldskúlaskipanini, hava eisini framleitt tilfar. Nám hevur verið í holt við at savna saman og kanna hetta tilfarið og gera uppskot um undirvísingartilfar til útlendingar, sum vilja læra føroyskt.

Nógv altjóða frálærutilfar til útlendingar er at halda seg til og fáa íblástur frá. Nám fer í næstum undir arbeiðið at týða eina týska undirvísingarbók til føroyskt. Avtalað verður undirskrivað við ein uttanfyristandandi at gera arbeiðið. Bókin er fyrst og fremst ætlað fremmandamæltum næmingum í 7., 8. og 9. í fólkaskúlanum, men Nám metir bókina eisini vera hóskandi til vaksnar útlendingar, sum skulu læra føroyskt. Mælt verður kortini til at hava meira fjølbroytt undirvísingartilfar, tí hendan bókin tekur støði í teimum ungu, og ikki vaksnum, ið skulu til lækna, til handils, út á arbeiðsmarknaðinum o.a. Nám nevnir møguleikan at menna temasíðurnar á snar.fo, so útlendingar kunnu brúka hana eisini, umframt aðrar tænastur á fartelefonini og internetinum.

Tað krevur meira arbeiðsorku á stovninum og størri fígging. Ynskið er at fáa eitt starvsfólk afturat, sum burturav arbeiðir við hesum. Tað kostar okkurt um 600.000 krónur um árið. Viðkomandi starvsfólk kann verða verkætlanarsett.

**7. Krav um førleikar fyri at fáa varandi uppihaldsloyvi**
*Mælt verður til, at útlendingar skulu hava staðið modul 2 fyri at fáa varandi uppihaldsloyvi. Treytirnar kunnu herðast við tíðini.*

Tá ið undirvísingarskipanin er royndarkoyrd, og námsætlan, útbúnir lærarar og undirvísingartilfar er tøkt, skal treytin um varandi uppihaldsloyvi verða tengt at skipanini.

Í fyrsta umfari verður mælt til, at útlendingur, sum hevur staðið modul 2, kann fáa varandi uppihaldsloyvi í Føroyum, um hann ella hon lýkur aðrar treytir eisini. Tað er umleið 20 vikur í alt, ítøkiliga tímatalið er framvegis óvist, men hetta samsvarar nøkulunda við kravið, sum verður sett í

Norra. Í Danmark er kravið, at útlendingur hevur staðið modul 6, umframt fleiri onnur krøv, fyri at fáa varandi uppihaldsloyvi.

Útlendingastovan mælir í sama viðfangi til at kanna, um ikki nóg gott undirvísingartilfar fyriliggur júst nú til í fyrsta umfari og beinanvegin seta krav um 20 samanhangandi vikur uttan próvtøku fyri at fáa varandi uppihaldsloyvi. Hesin møguleikin skal kannast nærri millum avvarðandi partar.

Útlendingastovan mælir til ikki at seta krøvini ov høgt í fyrsta umfari fyri at vita, hvørt tað røkkur sínum endamáli. Kravið kann herðast við tíðini. Leggjast skal upp fyri, at tað er serliga trupult hjá teimum úr Filipsoyggjunum og Teilandi at læra eitt nýtt mál.

Í Danmark kann mál- og samfelagsskeiðið eisini vera krav fyri at fáa familjusameining. Tann, sum søkir um familjusameining og makin, skulu lúka fýra av seks ásettum krøvum, millum annað undirvísing í donskum, virknið á arbeiðsmarknaðinum og fíggjarligan tryggleika. Føroyar kunnu við verandi lóggávu ikki áseta slíkt krav til familjusameining. Skal tað gerast, krevur tað, at danska fólkatingið ger broytingar í útlendingalógini. Mælt verður til at treytirnar til familjusameining í Føroyum eisini skulu tillagast.

### 8. Lata næmingum lestrarstuðul

*Mælt verður til, at útlendingar, sum melda seg til undirvísing í føroysum sum fremmandamáli, fáa lestrarstuðul sum partur av ÚS-skipanini.*

Útlendingar, ið læra seg føroyskt, fáa ikki lestrarstuðul, sum støðan er nú, bara ferðastuðul. Kvøldskúlar, sum hava skipað fyri undirvísing í føroyskum sum fremmandamáli, gera vart við, at nógvir útlendingar fullgera ikki skeiðið, tí tey taka á seg kvøldararbeiði ella hava torført við at fáa børnini ansaði. Fyri at lætta um hjá teimum at fara til undirvísing, og samstundis senda teimum eitt greitt tekin um, at Føroyar sum samfelag vilja stuðla teimum í at finna seg til rættis, eiga tey at fáa ávísan lestrarstuðul. Við lestrarstuðli ber eisini í størri mun til at hava undirvísingina um dagin. Bæði lærarar og næmingar halda, at tað kann vera trupult at læra eitt nýtt mál um kvøldarnar eftir ein arbeiðsdag.

Tað er trupult at siga nú, hvat hetta fer at kosta. Tað treytast millum annað, hvussu undirvísingarskipanin verður snikkað saman, og hvussu nógv melda seg til undirvísingina. Øll lesandi á hægri útbúgvingum ella styttri vinnuførleikagevandi útbúgvingum fáa kr. 4.362,00 í studningi um mánaðin í 12 mánaðir. Ein leyslig meting er, at 50 útlendingar verða í undirvísingarskipanini samstundis, tað vil siga 218.100 um mánaðin. Árliga verður kostnaðurin 2,6 mió. kr.

Danmark ger annars øvugt. Har verður eitt brúkaragjald kravt, 2.000 krónur, fyri hvørt modul. Tað hevur elvt til orðaskifti í Danmark, hvørt tað er rímiligt. Í ávisum førum binda vinnufyritøkur seg til at rinda brúkaragjaldið fyri síni starvsfólk, tí teimum tørvar skikkaða arbeiðismegi.

### 9. Virðismeta arbeiðsroyndir og útbúgvingar

*Mælt verður til at skunda undir arbeiðið at virðismeta arbeiðsroyndir og útbúgvingarnar hjá útlendingum.*

Fleiri útlendingar halda eina høvuðsforðing fyri væleydnaðari integrasjón vera, at teirra fakligu og arbeiðsligu førleikar ikki verða viðurkendir. Fleiri teirra, sum flyta til Føroya, eru útbúgvin í heimlandinum, millum annað innan handverk, sjúkrarøktarfrøði, pedagogikk, samskiftið og

ferðavinnu. Avbjóðingin er í flestu førum, at útbúgvingin ikki verður viðurkend í Føroyum. Tað ber við sær, at fleiri tilflytarar við útbúgving ikki eru í arbeiði ella arbeiða sum ófaklærd.

Skundað eigur at vera undir arbeiðið at virðismeta hesar útbúgvingarnar. Førleikametingin hjá Mentamálaráðnum/Yrkisdepilinum, Fróðskaparsetrið og ALS kundi tildømis verið við til at førleikamett og viðurkent arbeiðsroyndirnar og fakligu bakrundina hjá útlendingum, so teir fáa lættari atgongd til arbeiðsmarknaðin. Ein liður í hesum er eisini at fáa samstarv í lag við privata og almenna arbeiðsmarknaðin.

**10. Fáa skipan við leiðbeinarum**
*Mælt verður til at fáa eina skipan við leiðbeinarum, ið útlendingar kunnu brúka.*

Kommunufelagið hevur nevnt eina skipan við leiðbeinarum, sum skulu hjálpa nýkomnum tilflytarum at finna seg til rættis í Føroyum. Tað inniber, at ein nýkomin tilflytari fær ein leiðbeinara, hvørs uppgáva er at leiðbeina, ráðgeva og svara spurningum.

Við einum leiðbeinara verður helst lættari hjá útlendingum at stíga út í samfelagið og taka lut í frítíðarvirksemið, foreldrafundum, mentanartiltøkum og øðrum. Leiðbeinarar kunnu eisini samstarva tvørtur um kommunumørk og skipa fyri tiltøkum og øðrum, sum kunnu stimbra integrasjónina. Skipanir við sjálvbodnum leiðbeinarum – ambassadørum, sum tað verður kallað aðrastaðni - rigga væl í øðrum londum. Hetta er eitt stig, sum Kommunufelagið og kommunurnar eiga at taka, men landsmyndugleikin eigur í tann mun tað ber til at stuðla og stimbra eina slíka skipan.

Í Føroyum hava summar kommunur tikið stig til integrasjónstiløk við millum annað at samtykkja integrasjónspolitikk og skipa fyri mentanarligum tiltøkum, sum taka støði í ymiskleikanum. Afturat hesum áttu kommunur eisini at orðað og samtykt ein integrasjónspolitikk, sum hevði til endamáls at fremja lokala integrasjón, so nýggir borgarar fáa eina góða byrjan í Føroyum. Leiðbeinarar kunnu vera ein partur av hesum. Myndugleikarnir eiga at vera meira sjónligir á integrasjónsøkinum, og trivnaðarfunktiónirnar á staðnum eiga at nema sær neyðugu vitanina. Eggjast skal til enn fleiri integrasjónsfremjandi tiltøk og tilboð eru í øllum landinum. Útlendingastovan vil fegin vera við til at førleikamenna myndugleikarnar, men tað krevur tíð og pengar, sum gerst best við einum starvsfólki afturat.

**11. Eggja arbeiðsfólki at læra føroyskt**
*Mælt verður til at hava skipað undirvísingartilboð, ið koma til at Føroya at arbeiða*

Ein stórur partur av øllum tilflytarum koma til Føroya at arbeiða. Tey hava arbeiðs- og uppihaldsloyvi við teimum treytum, ið eru knýttar at hesum loyvum. Summi hava krav um at skula arbeiða minst 30 tímar um vikuna, og onnur skulu arbeiða minst 40 tímar um vikuna.

Tað er ein sannroynd, at størsti parturin av hesum fólkunum fer av landinum aftur, tá ið tørvurin á arbeiðsmegi minkar. Nøkur verða kortini verandi og seta búgv í Føroyum. Tilflytaramynstrið í Føroyum minnir nógv um tað í Álandi, har tey eisini hava eitt undirvísingartilboð til tilflytarar, ið koma at arbeiða. Tilboðið er skipað soleiðis, at allir arbeiðsgevarar á Álandi fáa boðið at senda starvsfólkini á málskeið ókeypis, um starvsfólki fær frí við løn helvtina av undirvísingartímunum. Talan er um stutt skeið, ið skulu geva tilflytarunum grundleggjandi førleikar í at málbera seg og skilja málið. Undirvísast kann bæði í hølum hjá arbeiðsgevarum ella sjálvum málskúlanum.

**FYLGISKJAL 1**

Hetta yvirlitið vísir talið av útlendskum kvinnum, sum hava gist í Kvinnuhúsinum seinastu árini. Kvinnuhúsið ger vart við, at útlendsku kvinnurnar, sum eru skrásettar frá 1990 til umleið 2000 vóru úr Evropa, serliga úr Grønlandi. Síðan ár 2000 hava flestu útlendsku kvinnurnar verið úr Asia og Afrika.




**ÚTLENDSKAR KVINNUR, SUM GISTA Í KVINNUHÚSINUM**

| Árstal | Gistandi kvinnur | Útlendskar kvinnur |
|---|---|---|
| 2018 | 12 | 4 |
| 2017 | 11 | 3 |
| 2016 | 6 | 2 |
| 2015 | 12 | 4 |
| 2014 | 17 | 5 |
| 2013 | 15 | 5 |
| 2012 | 15 | 6 |
| 2011 | 13 | 4 |
| 2010 | 11 | 3 |
| 2009 | 12 | 7 |
| 2008 | 18 | 9 |
| 2007 | 17 | 8 |
| 2006 | 13 | 3 |
| 2005 | 18 | 5 |
| 2004 | 16 | 6 |
| 2003 | 13 | 5 |

| | | |
|---|---|---|
| 2002 | 18 | 6 |
| 2001 | 15 | 3 |
| 2000 | 14 | 4 |
| 1999 | 21 | 2 |
| 1998 | 14 | 7 |
| 1997 | 12 | 5 |
| 1996 | 17 | 2 |
| 1995 | 18 | 3 |
| 1994 | 12 | 1 |
| 1993 | 13 | 3 |

**FYLGISKJAL 2**

Hetta yvirlitið vísir talið av teimum, sum fingu familjusameining í Føroyum frá 2012 til 2015. Feskastu tølini eru ikki tøk enn.

| **Ár** | | **Hjúnafelagar** | **Børn** | **Foreldur** | **Onnur** | **Í alt** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **2012** | Fyrstu ferð | 37 | 6 | 0 | 0 | 43 |
| | Longt loyvi | 77 | 17 | 1 | 2 | 97 |
| | | | | | | 130 |
| **2013** | Fyrstu ferð | 56 | 13 | 0 | 1 | 70 |
| | Longt loyvi | 101 | 15 | 1 | 1 | 118 |
| | | | | | | 188 |
| **2014** | Fyrstu ferð | 43 | 11 | 0 | 0 | 54 |
| | Longt loyvi | 77 | 22 | 0 | 2 | 101 |
| | | | | | | 155 |
| **2015** | Fyrstu ferð | 53 | 8 | 0 | 0 | 61 |
| | Longt loyvi | 90 | 21 | 0 | 1 | 112 |
| | | | | | | 173 |

**FYLGISKJAL 3**

Útlendingar á føroyska arbeiðsmarknaðinum tann 1. februar 2019

| | Løntakarar íalt | Norðurlendingar | Aðrir ES-ríkisb. | Aðrir evrop. ríkisb. | Onnur |
|---|---|---|---|---|---|
| Landbúnaður | **92** | 1 | 1 | 1 | 92 |
| Fiskiskapur | **1.504** | 7 | 20 | | 7 |
| Ali-kryvjivirki | **917** | 8 | 50 | 13 | 72 |
| Ráevnisvinna | **86** | 1 | | | |
| Fiskavøruídnaður | **1.058** | 8 | 50 | 13 | 117 |
| Skipasmiðjur o.a. | **832** | 2 | 84 | | 13 |
| Bygging | **2.387** | 13 | 165 | 9 | 13 |
| Orku-, vatnveiting | **162** | 1 | 1 | | |
| Handil, umvæling | **3.226** | 11 | 22 | 10 | 21 |
| Gistihús, matstovur | **819** | 6 | 19 | 6 | 74 |
| Sjóflutningur | **875** | 5 | 3 | 1 | 4 |
| Flutningur annars | **810** | 4 | 9 | 4 | 7 |
| Postur, fjarskifti | **355** | | 1 | 2 | 2 |
| Fígging, trygging | **769** | 2 | 1 | 1 | |
| Vinnul. tænastur | **932** | 8 | 19 | 2 | 5 |
| Húsarhaldstænastur | **396** | 2 | 12 | 7 | 39 |
| Landsfyrisiting | **618** | 4 | 2 | | 2 |
| Kommunur, ríkiss. | **3.716** | 23 | 13 | 16 | 27 |
| Undirvísing | **1.748** | 11 | 16 | 3 | 13 |
| Heilsu- og almannav. | **3.547** | 16 | 13 | 2 | 18 |
| Felagsskapir, mentan | **661** | 16 | 8 | 12 | 10 |
| Ótilskilað, v.m. | **281** | 3 | 1 | | 4 |
| Allar vinnugreinar | **23.449** | 160 | 498 | 97 | 459 |

**FYLGISKJAL 4**

**ÚTLENDINGAR Í FØROYUM TANN 1. JANUAR 2019, BÝTT Á RÍKISBORGARASKAP**

| **Ríkisborgaraskapur:** | **Í alt:** | **Menn:** | **Kvinnur:** |
|---|---|---|---|
| Afganistan | 1 | 1 | 0 |
| Albania | 1 | 1 | 0 |
| Amerikanskur jomfrúoyggjarnar | 1 | 0 | 1 |
| Algeria | 0 | 0 | 0 |
| Angola | 0 | 0 | 0 |
| Argentina | 2 | 0 | 2 |
| Armenia | 1 | 1 | 0 |
| Avstralia | 6 | 2 | 4 |
| Bangladesj | 0 | 0 | 0 |
| Barbados | 1 | 1 | 0 |
| Belgia | 0 | 0 | 0 |
| Belgia og Luksemburg | 1 | 0 | 1 |
| Bolivia | 0 | 0 | 0 |
| Bosnia-Hersegovina | 6 | 5 | 1 |
| Brasil | 25 | 7 | 18 |
| Bretland | 71 | 44 | 27 |
| Bulgaria | 52 | 48 | 4 |
| Danmark | 49.542 | 25.603 | 23.939 |
| Egyptaland | 4 | 4 | 0 |
| Ekvador | 5 | 2 | 3 |
| El Salvador | 1 | 0 | 1 |
| Estland | 5 | 4 | 1 |
| Etiopia | 11 | 4 | 7 |
| Filipsoyggjar | 197 | 37 | 160 |
| Finnland | 11 | 7 | 4 |
| Fílabeinsstrondin | 6 | 1 | 5 |

| Ríkisborgaraskapur: | Í alt: | Menn: | Kvinnur: |
|---|---|---|---|
| Frakland | 8 | 3 | 5 |
| Gambia | 3 | 1 | 2 |
| Gana | 24 | 14 | 10 |
| Grikkaland | 1 | 0 | 1 |
| Guatemala | 1 | 1 | 0 |
| Honduras | 0 | 0 | 0 |
| Hong Kong | 1 | 0 | 1 |
| Hvítarussland | 0 | 0 | 0 |
| India | 20 | 15 | 5 |
| Indonesia | 11 | 3 | 8 |
| Irak | 5 | 2 | 3 |
| Iran | 5 | 2 | 3 |
| Italia | 8 | 4 | 4 |
| Írland | 1 | 0 | 1 |
| Ísland | 181 | 104 | 77 |
| Ísrael | 3 | 2 | 1 |
| Jamaika | 4 | 1 | 3 |
| Japan | 2 | 2 | 0 |
| Jordan | 1 | 1 | 0 |
| Jugoslavia | 2 | 1 | 1 |
| Kabo Verdi | 0 | 0 | 0 |
| Kambodja | 0 | 0 | 0 |
| Kamerun | 0 | 0 | 0 |
| Kanada | 8 | 1 | 7 |
| Kekkia | 1 | 1 | 0 |
| Kenja | 21 | 6 | 15 |
| Kili | 5 | 3 | 2 |
| Kina | 19 | 7 | 12 |

| Ríkisborgaraskapur: | Í alt: | Menn: | Kvinnur: |
|---|---|---|---|
| Kolumbia | 5 | 0 | 5 |
| Kroatia | 10 | 5 | 5 |
| Kuba | 0 | 0 | 0 |
| Lettland | 12 | 12 | 0 |
| Libanon | 1 | 1 | 0 |
| Liberia | 4 | 1 | 3 |
| Lybia | 1 | 1 | 0 |
| Litava | 32 | 25 | 7 |
| Madagaskar | 2 | 1 | 1 |
| Makedónia (FMJ) | 14 | 8 | 6 |
| Malaisia | 4 | 2 | 2 |
| Malta | 2 | 1 | 1 |
| Marokko | 3 | 2 | 1 |
| Meksiko | 8 | 4 | 4 |
| Moldova | 1 | 1 | 0 |
| Móritius | 9 | 3 | 6 |
| Myanmar (Burma) | 1 | 0 | 1 |
| Namibia | 4 | 2 | 2 |
| Nepal | 3 | 1 | 2 |
| Niðurlond | 7 | 2 | 5 |
| Niger | 1 | 0 | 1 |
| Nigeria | 15 | 8 | 7 |
| Noreg | 93 | 41 | 52 |
| Nýsæland | 2 | 2 | 0 |
| Nýsælendska havið | 1 | 0 | 1 |
| Pakistan | 5 | 3 | 2 |
| Paraguai | 0 | 0 | 0 |
| Peru | 17 | 8 | 9 |

| **Ríkisborgaraskapur:** | **Í alt:** | **Menn:** | **Kvinnur:** |
|---|---|---|---|
| Portugal | 2 | 1 | 1 |
| Pólland | 129 | 101 | 28 |
| Rumenia | 230 | 178 | 52 |
| Russland | 28 | 8 | 20 |
| Sambandsríki Amerika (USA) | 30 | 14 | 16 |
| Sambia | 1 | 1 | 0 |
| Senegal | 5 | 3 | 2 |
| Serbia og Montenegro | 69 | 36 | 33 |
| Sierra Leona | 2 | 1 | 1 |
| Singapor | 1 | 0 | 1 |
| Slovakia | 9 | 4 | 5 |
| Slovenia | 0 | 0 | 0 |
| Sovjetsamveldið | 4 | 1 | 3 |
| Spania | 9 | 6 | 3 |
| Sri Lanka | 2 | 2 | 0 |
| St. Vinsent og Grenadinoyggjar | 0 | 0 | 0 |
| Sudan | 0 | 0 | 0 |
| Suðurafrika | 6 | 0 | 6 |
| Suðurkorea | 2 | 1 | 1 |
| Sveis-Liktinstein | 3 | 0 | 3 |
| Svøríki | 34 | 21 | 13 |
| Sýria | 0 | 0 | 0 |
| Teiland | 120 | 25 | 95 |
| Taivan | 1 | 0 | 1 |
| Tansania | 1 | 1 | 0 |
| Togo | 1 | 0 | 1 |
| Trinidad og Tobago | 2 | 0 | 2 |
| Tunesia | 15 | 11 | 4 |

| **Ríkisborgaraskapur:** | **Í alt:** | **Menn:** | **Kvinnur:** |
|---|---|---|---|
| Turkaland | 6 | 6 | 0 |
| Týskland | 16 | 7 | 9 |
| Uganda | 4 | 0 | 4 |
| Ukraina | 19 | 5 | 14 |
| Ungarn | 12 | 6 | 6 |
| Venesuela | 4 | 2 | 2 |
| Vjetnam | 2 | 0 | 2 |
| Ókent | 25 | 13 | 12 |